Ítróttar
Sosialurin

Nr. 90 • mikudagur • 10. mai 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Fótbólturin er í vanda

**– Ágangurin á okkara fótbóltsdómarar er alsamt vaksandi, og veruligur vandi er fyri, at neyðugt verður at niðurleggja partar av fótbóltskappingini, sigur FSF-forsetin, Óli Holm, í eini óvanligari áheitan á spælarar, áskoðarar og onnur. Hann heitir á fólk um at gevast við at hótta, illtonkja og spilla dómararnar út**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*




*– Skal tað veruliga vera so, at dómarar okkara skulu hava løgreglu- og ella aðra trygdarverju fyri at røkja dómaragerningin eins og fyri at hava eitt rímuligt privatlív, tí at fólk føla trongd at gera seg inn á teir, spyr Óli Holm, FSF-forseti. Hann stúrir fyri, at partar av føroysku fótbóltskappingini mugu steðga, tí fólk fara so illa við dómarunum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað hava verið óvanliga nógvar sjónligar illstøður millum spælarar, dómarar, venjarar og áskoðarar í bestu mansdeildini í fótbólti í hesum kappingarárinum.

Rok í Havn, rok í Klaksvík, rok í Vági, ja, hvørt umfar hevur havt sínar samanbrestir, reyðu kort og tvídráttir, og í bløðunum hava hvøss lesarabrøv borið brenni til bálið.

Hetta fær nú FSF-forsetan, Óla Holm, at koma við einari óvanligari áheitan á spælarar, leiðarar, áskoðarar og onnur.

– Eins og í 2005 er ágangurin á okkara fótbóltsdómarar alsamt vaksandi, og vit kunnu staðfesta, at tað veruliga er vandi fyri, at neyðugt verður at niðurleggja partar av landskappingini, um ikki vend kemur í, sigur Óli Holm í sínari áheitan.

### Miðlarnir eiga sín lut

FSF-forsetin heldur, at tað ger ikki støðuna betur, at fjølmiðlarnir fylgja væl við í øllum tí, sum fer fram á vøllinum, tá ið dystir í Formuladeildini verða spældir.

– Tað bøtir tíverri ikki um støðuna, at ávísir fjølmiðlar alsamt tykjast leggja seg eftir at draga fram støður, har sáddur verður ivi um førleika og døming hjá dómarunum í síni heild, heldur enn at seta fótbóltsspælið í miðdepilin, sigur Óli Holm.

– Dómararnir hava eina torføra uppgávu á vøllinum, og vit ivast onga løtu í, at teir døma eftir síni sannføring. Og er tað av størsta týdningi fyri fótbóltin, at øll gera sær greitt, at meting dómarans í hvørjum einstøkum føri er galdandi; teirra avgerð á vøllinum er endalig og eigur og má góðkennast, óansæð um ein er samdur ella ikki.

### Stuðla heldur enn at háða

Óli Holm heldur, at atburðurin hjá summum spælarum, venjarum og áskoðarum er á heilt skeivari leið, og atburðurin er til vanda fyri fótbóltskappingina í Føroyum.

– Dómarar verða ikki betri dómarar við at verða útspiltir, háðaðir, illtonktir, hóttir og at rópt verða ókvæmisorð eftir teimum, nei teir – sum vit øll onnur – hava brúk fyri stuðli til tað arbeiða, sum teir eru settir til, og sum teir fyrst og fremst gera av áhuga fyri fótbóltspælinum, sigur Óli Holm

– Vit í Fótbóltssambandinum hava kenslu av, at útspilling, happing, tileinkisgerðing av dómarunum hevur tikið yvirhond, og at tað, sum støðan er í løtuni, ikki er tespiligt hjá okkara dómarum at døma dyst ella at ferðast i hesum landi, og tað kann aldri vera rætt.

– Skal tað veruliga vera so, at dómarar okkara skulu hava løgreglu- og ella aðra trygdarverju fyri at røkja dómaragerningin eins og fyri at hava eitt rímuligt privatlív, tí at fólk føla trongd at gera seg inn á teir, spyr FSF-forsetin.

– Fótbóltssambandið vil tí staðiliga heita á fjølmiðlar, áskoðar, leiðarar, leikarar og annars øll, sum vilja føroyskum fótbólti væl, um at sláa ring um okkara dómarar og geva teimum tað viðurkenning og tann stuðul, sum teir náttúrliga hava brúk fyri – soleiðis at vit kunnu halda fram við fótbóltskappingini á ein virðiligan og siðiligan hátt, sigur Óli Holm.

# Spennandi Panic-loysn í HB

**Tað kostaði HB sigurin í steypadystinum ímóti VB/Sumba, at ein spælari ikki hevði sítt spæliloyvi í lagi. Í annaðkvøld spæla HB og VB/Sumba aftur dyst ímóti hvørjum øðrum**

HB-VB/SUMBA
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

HB fær í annaðkvøld vitjan av VB/Sumba í Formuladeildini. Tá ið feløgini seinast spældu ímóti hvørjum øðrum, var tað í steypakappingini, og tá vann HB trygt. Eftirspælið hevði tó við sær, at HB varð dømt at tapa dystin, tí eitt spæliloyvi hjá teimum var ikki í lagi.

Nú spæla feløgini aftur ímóti hvørjum øðrum, og hesaferð verður dysturin avgjørdur á vøllinum.

HB hevur fingið styrk í enum nýggjum serbiskum spælara, sum fyrstu ferð var við sunnudagin. Hóast hann bert spældi ein hálvleik í Klaksvík, sannførdi Panic øll um, at hann verður ein fongur fyri HB-liðið. Roknað verður við, at Panic verður á vøllinum frá byrjan í kvøld.

Jákup á Borg hevur verið eymur í lúskuni eftir dystin í Klaksvík, og málmaðurin Bárður Johannesen hevur ein snudd í knænum, men teir verða báðir tøkir til dystin í morgin.

Hjá VB/Sumba er lagið munandi betur nú, enn tað var fyri tveimum vikum síðani. Einasta Suðuroyarliðið í Formuladeildini hevur vunnið sínar tveir seinastu dystir, og hóast uppgávan í Gundadali í morgin verður strævin, hava teir gott mót. VB/Sumba fer fullmannað til Havnar at dystast við HB.

## Ingi slapp við skelkinum

Ingi Højsted hevur eftir øllum at døma ikki slitið krossbandið, sum annars varð roknað við. Ein lækni við kunnleika til slíkar skaðar kannaði Inga í gjár, og hann heldur, at krossbandið er toygt.

Ingi fekk skaða í dystinum ímóti HB fyri tveimum vikum síðani, og í fyrstu syftu vóru boðini til Inga, at krossbandið var slitið. Men Ingi sleppur við skelkinum.

Gongur tað væl, kann Ingi Højsted spæla fótbólt aftur um nakrar vikur. Ingi skal nú í holt við at venja spakuliga aftur. Heimasíðan hjá B36 skrivar, at í fyrstu syftu skal hann renna, og so skal hann vita, hvussu skaðin í knænum fer at laga seg.

## Mortan aftur á landsliðnum

Gjáramorgunin varð tað staðfest, at Jón Rói Jacobsen hevur slitið krossband í knænum, og hann kann tí ikki spæla fótbólt aftur í ár.

Tí hevur landsliðsvenjarin Jógvan Martin Olsen tikið Mortan í Hørg út til dystin ímóti Póllandi sunnudagin. 25 ára gamli Mortan í Hørg hevur spælt 4 landsdystir fyri Føroyar.

## Todi klárur at spæla

Norska felagið Start spælir í kvøld ímóti Arendal í steypakappingini. Todi Jónsson verður helst við á liðnum hjá Start til hendan dystin. Heimasíðan hjá Start skrivar, at viðgerðin av einum skaða hjá Toda í fótliðnum hevur gingið væl, og Todi kann spæla við fullari ferð. Sunnudagin spældi Todi allar 90 minuttirnar í dystinum hjá Start ímóti Lillestrøm.

## Met og gullmerki

Tað gekst væl, tá fýra føroyingar um vikuskiftið tóku lut í Tårnby Games, sum er kapping í frælsum ítrótti. Rannvá Djurholm, Bjørk Herup Olsen, Regin Joensen og Rúni Seloy vóru føroysku umboðini, og tey fingu framúr úrslit. Millum annað setti Bjørk nýtt føroyskt met á 1500 metra teininum við 5.11,96, meðan Regin Olsen vann gull á 800 metra teininum.